# Dragin fyri fullum seglum

**Dragin er nú riggaður til tað, sum skipið er best egnað til, nevniliga at sigla við ferðafólki undir fullum seglum.**

SEGLSKIP

*Snorri Brend*

**Klaksvík:** Eftir at hava riggað hetta skúlaskipið til, er nú klárt at fara á fyrstu túrarnar við ferðafólki undir fullum seglum.

Í allan vetur hava lærarar og næmingar arbeitt og stríðst fyri sakini, og hava sæð fram til dagin, tá skútan umsíðir kundi leggja frá landi.

Tað eydnaðist so í farnu viku, tá Dragin var á sínum fyrsta túri. Og sum skilst er lítið sum bendir á, at skipið verður liggjandi leingi við bryggju á Varpabrúnni ísenn.

Allan henda mánaðin er skipið nógv leigað út, m.a. til starvsfólkaferðir og skúlaflokkar sum við Draganum hava vilja sæð, hvussu fuglabjørgini norðan fyri síggja út "from the seaside"

## Undirvísing

Í allan vetur hava lærarar og næmingar vaskað seglini umborð, hava skravað og lakkerað bummar, gaflar og blokkar, umframt annað arbeiði. Alt hetta hevur verið gjørt innandura, men alt arbeiðið hevur nú staðið sína roynd á sjónum uttandura.

Í vetur hava eisini teir næmingarnir í framhaldsdeildini í Klaksvík, sum hava valt sjóvinnu, brúkt nógva tíð umborð á Draganum, her teir hava fingið bæði verkliga og bókliga undirvísing.

Nú er liðugt at liggja við bryggju, tí nú skal skipið brúkast til tað, sum tað er best egnað til, nevniliga at sigla við skúlaflokkum, ferðafólki og øðrum.

– Hetta er triðja summarið at Dragin er í sigling sum seglskip og skúlaskip, upplýsir Hans Eli Hansen, ein av forsprákarunum fyri seglskipið.



*Dragin er vælegnað til túrar av ymiskum slagi, m.a. hjá teimum, sum dáma væl at fiska*

*Mynd: Dragin*

# Opnar dyr fyri teim ungu

**Nú norðoyastevna stendur fyri durum, er mangt spennandi á skránni hjá kuffunum**

**Klaksvík:** Nøkur av tiltøkunum eru afturvendi, tó við nýggjum og spennandi ísletti, ímeðan onnur eru nýggj.

Norðoyastevnan í ár er sermerkt við tað at komandi ár verður møguleiki fyri at koyra undir Leirvíksfjørð, so hetta er ikki lítið sermerkt.

## Opið hús

Hvørt fríggjakvøld er vanliga "opið hús" í KFUM&K, men á norðoyastevnu verður gjørt enn meira burturúr.

Tá verður tað soleiðis at húsið verður opið frá kl 22, samstundis sum nøkur ungfólk úr KFUM&K fara at bjóða suppu á Posthúshorninum, og býta út traktatir. Í hesum sambandi fara tey eisini at bjóða fólki niðan í KFUM&K til livandi tónleik.

Tí tað verður nevniliga so, at bólkarnir Credo og J-&-Co koma at framføra livandi tónleik, meðan tey vitjandi kunnu hugna sær við práti, spølum, fußball, kaffi og øðrum.

## Ungdómsmøti

Leygarkvøldið kl. 21 er ungdómsmøti, har Christian Joensen úr Fuglafirði tosar. Gospelkórið Gleði syngur og góður matur er á skránni.

## Jay Leno-show

Eitt hitt mest vitjaða tiltakið á Norðoyastevnu man vera Caféin, ið er beint eftir miðnáttarhaldi í Vágstúni.

Tá plaga gomul sum ung at leita sær niðan í KFUM &K til breyð við góðum viðskera, kakur og annað, samstundis sum tey fáa livandi tónleik, prát, hugna og annað við.

Seinasta ár varð henda caféin skipað í sonnum Jay Leno-stíli, har verturin fyri caféini hevði ein stovu, har gestir og tónleikarar vitjaðu.

Hetta var so væleydnað at tað verður endurtikið aftur í ár, og bygt út við meira hugna, størri stovu og stórskíggjum.

Í ár er ætlanin at síggja nakrar av 1. deildarleikarunum hjá KÍ vitja í stovuni, umframt at onnur koma á gátt.

Umframt tónleik, mat, andakt, prát og hugna, so kemur dramabólkurin Fløðir eisini at framføra eitt dramastykki.

## Tónleikacafé

Norðoyastevnudag kl. 15 er tónleikacafé á skránni. Hetta er eitt afturvendandi tiltak, sum hevur fleiri ár á baki. Tiltakið savnar alla familjuna til felagssang, kórsang, drekka, stutta andakt. Í ár fara børn av Viðareiði at luttaka við sangi.

Salurin plagar at vera fullsettur til hetta tiltak hvørt ár, og tí bjóða vit øllum hjartaliga vælkomnum aftur í ár - og ja, er fult, so vísa teir bara tiltakið á stórskíggja í øðrum sali eisini!

**sb.**




